Sersáttmáli millum

Maskinmeistarafelagið

Og Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Sersáttmáli fyri maskinmeistarar við størri skipum í frálandavinnu

## §1 Sáttmálaøki

Hesin sáttmáli fevnir um skip í frálandavinnu, har bæði  BT og framdráttarmegi eru 3000 ella hægri. Sáttmálin er eisini galdandi fyri tænastuskip til alivinnuna, sum eru skrásett í føroysku altjóða skipaskránni.

**Stk. 2.** Uttan mun til ásetingina í stk. 1 fevnir sáttmálin um skip undir 3000 BT / KW um manningin verður lønt mánaðarliga.

**Stk. 3.** Høvuðssáttmálin millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið fyri Handilsskip er galdandi fyri hesi skip í tann mun niðanfyri nevndu viðurskifti ikki víkja frá høvuðssáttmálanum. Undantikið er tó §2 stk. 10-12 í høvuðssáttmálanum, sum ikki er galdandi.

## § 2 Hýrur

Mánaðarliga hýran verður ásett við útgangsstøði í høvuðssáttmálanum fyri tann lønarflokk, sum er galdandi fyri tað ávísa skipið í KW.

**Stk.2.** Fasta mánaðarhýran er fyri 12 tímar um samdøgrið.

**Stk. 3.** Lønin er ásett í fylgisskjali til henda sáttmála og er at meta sum partur av hesum sáttmála. Viðbót fyri ásetingina í § 5, stk, 1 í hesum sersáttmála fyri frálandavinnu (Multi purpose standby, supply- og ankerhandler vessels) er íroknað lønirnar í hesi lønartalvu. Hetta merkir, at verður ásetingin broytt, verður lønartalvan broytt samsvarandi.

## § 3 Yvirtíð

Um farið verður út um 84 tímar um vikuna, verður goldin yvirtíð sambært reglunum í § 3 í høvuðs-sáttmálanum.

## § 4. Frítíð og útmynstring

Arbeitt verður eftir einari 1:1 skipan. Ferðing er íroknað frítíð, sí tó avmarkingar í stk. 2. Íroknað hesum frídøgum er frítíð sambært løgtingslóg um frítíð við løn nr. 30 frá 7. apríl 1986 við seinni broytingum.

**Stk. 2.** Útmynstringin er í mesta lagi 6 vikur umborð, og 2 dagar til ferðing samanlagt báðar vegir. Triði ferðadagur er at rokna sum 0-dagur. Um siglt verður uttanfyri Norðurevropa er útmynstringin tó í mesta lagi 8 vikur umborð, og 3 dagar til ferðing samanlagt báðar vegir.

**Stk. 3.** Um farið verður út um ávikavist 6 og 8 vikur umborð verður goldið $^{1}/_{2}$ frídag eyka fyri hvønn dag út yvir. Um farið verður 14 dagar út um ávikavist 6 og 8 vikur, verður goldið 1 frídag eyka fyri hvønn dag út yvir teir 14. Hetta er tó ikki galdandi um maskinmeistari sjálvur hevur ynskt, at vera longur umborð.

## § 5. Arbeiðssteðgur

Maskinmeistarar, íð mynstra eftir hesum sersáttmála frásiga sær rættin til, at fara í arbeiðssteðg í eitt 4 ára skeið, roknað frá 1. mars 2024.

**Stk. 2.** Hýruhækkingar í høvuðssáttmálanum eru eisini galdandi fyri henda sáttmála við somu gildiskomu.

**Stk. 3.** Sjálvt um sáttmálin er uppsagdur, og tíðarfreistin fyri endurnýggjan er úti, skulu partarnir yvirhalda gamla sáttmálan til ein nýggjur er góðkendur ella arbeiðssteðgur er settur í verk eftur reglunum niðanfyri.

**Stk. 4.** Partarnir viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum til at lýsa og seta í verk arbeiðssteðg eftir hesum reglum.

**Stk. 5.** Arbeiðssteðgur kann bert setast í verk um so er, at hann er rættstundis fráboðaður mótpartinum.

**Stk. 6.** Um tað er ætlanin, at seta arbeiðssteðg í verk, skal tað kunngerast hinum partinum við serligum innskrivaðum brævi í minsta lagi 1 mánaða frammanundan, at arbeiðssteðgurin er ætlaður at verða settur í verk.

**Stk. 7.** Sum arbeiðssteðgur er her at rokna verkfall, verkbann, ella onnur niðurlegging av arbeiðinum. Tað er ikki loyvt at seta í verk arbeiðssteðg, meðan sáttmálin er í gildi.

## §6 Bjarging
Um reiðaríið við sáttmála hevur frásagt sær rætt til bjargingarløn í tí dagliga arbeiðinum, hava maskin-meistarar og motorpassarar ikki rætt til bjargingarløn.

## § 7. Gildi sáttmálans
**Stk. 1**. Hesin sáttmálin tekur við 1. mars 2023. Viðvíkjandi uppsøgn fylgir hann høvuðssáttmálanum.

Tórshavn, 17. februar 2023

Maskinmeistarafelagið

Reiðarafelagið fyri Handilsskip